Skulu ikki eta heilan á seyði

Tað er vónleyst at forða fyri, at kjøt av seyði, sum er smittaður við ridluskriða, verður selt



Tað er onki, sum bendir á, at tað er heilsuskaðiligt at eta kjøt av seyði, hóast hann er smittaður av ridluskriða (tilvildarlig mynd)

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað er ongin møguleiki at forða fyri, at kjøt av seyði, sum er smittaður við ridluskriða, verður selt í handlunum.

Birna Mørkøre á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sigur, at haðani ber ikki til at gera nógv fyri at forða fyri, at kjøt av seyði, sum er smittaður við ridluskriða, verður selt.

Hon sigur, at fyri tað fyrsta verður tað allarmesta kjøtið selt privat.

Men harafturat er tað sera trupult at ávísa smittuna hjá seyði.

– Seyður gongur smittaður í fleiri ár, áðrenn hann fær nøkur sum helst sjúkueyðkenni.

Og í alla hesa tíðina er tað bara stutt áðrenn at hann verður ordiliga sjúkur, at tað ber til at ávísa smittuna.

Higartil hevur einasti máti at ávísa sjúkuna, verið at drepa seyðin og at kanna heilan.

Men hon leggur afturat, at tað verður arbeitt við ymsum hættum, so at tað ber til at ávísa sjúkuna fyrr, men hon veit ikki, hvussu langt tað er komið. Men skulu vit tryggja, at onki kjøt frá smittaðum seyði verður selt, skulu vit kanna hvønn einasta seyð- og sjálvt tá ber bara til at ávísa smittuna beint áðrenn sjúkan brýtur út, so eyðsæð er tað ómøguligt.

Tó leggur hon afturat, at eftir matvørulógini er tað bannað at selja seyð til matna, sum er sjúkur yvirhøvur.

Annars vísur Birna Mørkøre á, at higartil hava vit ikki vitað, at ridluskriði hjá seyði smittar fólk.

– Ridluskriðið er ein gomul sjúka. Men ongastaðni, har ridluskriði er, hava vit staðfest fleiri tilburðir av Jacob Creutzfeldt, enn í økjum, har ridluskriði ikki er.

Tí er tað ongin orsøk at halda uppat at eta seyðakjøt, tí tað átti at verið vandaleyst, hóast seyðurin skuldi víst seg at verið smittaður.

Kortini heldur Heilsufrøðiliga Starvsstovan, at vit skulu vera fyrivarin og tí hevur hon mælt fólki frá at eta heilan á seyði, helst á gomlum seyði, sum kanska hevur gingið við smittuni leingi. Og annars mælir starvsstovan altíð frá at eta kjøt av sjúkum seyði, antin talan so er um eina sjúku, ella eina aðra. Og tað álit hevur Birna Mørkøre á føroysku bøndrunum, at teir selja ikki kjøt av seyði, sum hava ábendingar um eina ella aðra sjúku.

Les meiri á síðu 6

Ridluskriði er um alt landið

Ridluskriði er ein seyðasjúka, sum nú er um alt landið.

Landsdjóralæknin sigur, at heilir 84 hagapartar í Føroyum eru avbyrgdir tí at seyðurin har hevur verið í sambandi við seyð úr hagum, har ridluskriði er staðfestur.

Higartil er ridluskriði staðfestur í fýra hagapørtum, sigur Bjørn Harlou. Fyri at forða fyri, at smittan breiðir seg, hevur tað mangan verið bannað at flyta seyð ímillum oyggjarnar.

Tað er heldur ikki loyvt at flyta seyð ímillum til dráps, uttan úr Lítlu Dímun til Hvalbiar.

Annars er tað bert loyvi at flyta aliseyð ímillum oyggjarnar, eftir undantaksloyvi frá landsdjóralæknanum.

Tað er heldur ikki loyvt at flyta seyð úr einum hagaparti, sum er avbyrgdur, í ein annan hagapart.

- - - - -

Higartil eru hesar bygdir og hesir hagapartar avbyrgdir:

Norðoyri Miðhagi og Líðarhagi.
Leirvík.
Fuglafjørður
Norðragøta: Yviri í Dal.
Rituvík.
Toftir: Heimasti partur og Miðjan Yviri í Haga.
Elduvík: Frammi í Haga, Pálstovupartur.
Funningur: Innari Partur, Inni í Haga.
Eiði.
Saksun: Kvíggjarhamarshagi.
Streymnes: Heimara helvt í Sundinum.
Hvalvík: Toftadalshagi.
Kollafjørður: Todneshagi, Miðgerðishagi, á Hjøllum, Hamrahagi á Hjøllumið undirliggjandi traðum, Sjóvarhagi, niðari partur við undirliggjandi traðum frá markinum við Todneshaga, inn til og við Millum Bóla.
Norðradalur: Presthagi.
Sørvágur, tó ikki hagaparturin Teigarnir.
Miðvágur: Tó ikki hagapartarnir norðan fyri Heimara Leiti.
Skálavík
Húsavík
Dalur
Hvalba og **Sandvík**
Hov
Harafturat er Suðurstreymoy avbyrgt, sigur Landsdjóralæknin.

Eysturoyingar vilja standa saman

Áhugin var stórur fyri fundi, sum mánakvøldið var fyri vinnuna, lokalpolitikarar og landspolitikarar

JÓANNES HANSEN

Tað er nógv og fjølbroytt vinnuligt virksemið í Eysturoynni. Tað var sjón fyri søgn av hesum, tá skipað varð fyri fundi mánakvøldið. Nakrir vinnulívsmenn høvdu bjóðað umboðum fyri vinnufyritøkur av øllum slagi til fundar saman við umboðum fyri kommunurnar og landspol-itikarunum. Upp ímóti hálvt annað hundrað fólk vóru á fundinum. Formaðurin í Runavíkar kommunu, Jákup Lamhauge, bjóðaði vegna fyrireikararnar vælkomið klokkan sjey, og tá klokkan nærkaðist hálvgum ellivu og fundurin endaði við at samkoman reistist og sang fyrsta ørindi av tjóðsanginum, høvdu sjey framløgur verið, umframt at umboð fyri vinnuna og politikararnir høvdu verið uppií siðiligum kjaki, har dentur varð lagdur á at orða seg stutt og greitt fyri at geva rúm fyri so mongum, sum tað bar til.

Fundurin var ivaleyst tann fyrsti av sínum slagi í oynni, og landspolitikararnir vóru millum teirra, ið søgdu seg vera væl nøgdar við tiltakið. Teir søgdu seg fegnar vilja hava samband við vinnuna, og teir heittu á vinnuna um eisini at vera við til at røkja sambandið við politiska myndugleikan.

Oljan stóran leiklut

Fundurin var fyri feløg og fyritøkur av øllum slagi, og umboðanin var breið innanfyri fiskivinnu á sjógvi og landi, ídnaðarfyritøkur, tænastufyritøkur, sum hava við primervinnuna og sekundervinnuna at gera og innanfyri aðrar tænastufyritøkur.

Sum so nógva aðra staðni í landinum, so fylgir vinnulívið í Eysturoynni væl við í tí, sum hendir á oljuøkinum. Vinnan heldur seg vera í minsta lagi eins væl fyri at taka ímóti oljuvinnuni sum vinnurnar í øðrum økjum í landinum, og boðini til politikararnar frá vinnuni vóru, at tað skal vera vinnan sjálv og ikki politiski myndugleikin, sum skal finna út av, hvar útgerðarhavnin til oljuvinnuna skal vera.

Víst var á, at talið á virkjum er sera stórt, og at talan er um fjølbroytta vinnu, sum er før fyri at bjóða vørur og tænastur á mest sum øllum økjum. Sjónarmiðið, at tað er neyðugt at standa saman samstundis sum talan er um sunna innanhýsis kapping varð borið fram, og tað varð ásannað, at tað er alneyðugt, tá ovurstórar avbjóðingar standa fyri framman, at vinnan samstarvar, og at samstarvið millum vinnuna, kommunurnar og landspolitikararnar alla tíðina verður styrkt.

Framtíðin

Fundurin gjørdi ikki nakra niðurstøðu og tað var heldur ikki ætlanin. Heldur var ætlanin í fyrstu atløgu at hittast og at siga frá, hvat gongur fyri seg á ymisku vinnuligu økjunum og at samtala um felags áhugamál hjá vinnuni innanhýsis, sum aftur eru av áhuga fyri kommunurnar og ikki minst politikararnar, sum umboða valdømið í løgtinginum og í landsstýrinum.

Aðra staðni í landinum eru vinnufeløg við ymiskum heitum. Einki sovorðið er í Eysturoy, og tað var ikki



undan fundinum lagt upp til at stovna nakað sovorðið ráð ella felag, men fundurin var samdur í tí skilagóða eisini í framtíðini at tosa saman og at hava fundir, kanska ikki altíð so breiðar, sum hesin fundurin skuldi vera og var.

Uppleggini

Seks persónar lýstu í stuttum støðuna hjá vinnuni í Eysturoynni, hvussu gongdin hevur verið seinastu fjórðingsøldina, hvussu vinnan lagaði seg í kreppuárunum, hvussu støðan er í dag, og hvørjir møguleikarnir eru í framtíðini, og hvussu sum mest kann fáast burturúr møguleikunum, sum framtíðin tykist hava at bjóða.

Símun Hammer, virkisráðgevi, lýsti í tølum støðuna hjá vinnuni í oynni, Olaf Olsen segði nøkur orð um fiskivinnuna á sjógvi og landi, Kári Johannesen greiddi frá tænastuvinnunum, Regin Jacobsen tosaði um alivinnuna, Bergur Poulsen tosaði um aðrar vinnur, enn tær omanfyri nevndu, og Nils Sørensen tosaði um oljuvinnuna, og um møguleikarnar, sum Eysturoyggin hevur at vera við í nýggju og ógvusligu vinnuni.

Halgafelli sigldi á land og sakk

Beint áðrenn klokkan trý í gjáramorgunin fekk bjargingartænastan í Bodø boð um, at frystifarmaskipið Halgafelli, var farið á land við Andøya. Skipið fór sjálvt av aftur, men hevði fingið so stóran skaða, at tað sakk. Øll manningin varð bjargað

SVEINUR TRÓNDARSON

Klokkan var farin beint av hálvgun tvey gjáranáttina, tá Halgafelli, av Glyvrum, bar við ein flúr uttan fyri Andoynna í Norðurnoregi.

Halgafelli var á veg úr Myhre, í Lofoten, til Tromsø, tá tað bar við flúrin, og klokkan 01.55 fekk bjargingartænastan í Bodø boð frá skipinum.

Torbjørn Jacobsen, skipari, var sjálvur á brúnni tá tað tók, og hann fór alt fyri eitt undir at fáa skipið av aftur, samstundis sum hann boðaði norsku bjargingartænastuni frá.

Tað eydnaðist at fáa skipið av aftur, men skaðin skipið hevði fingið var so stórur, at tað fekk alsamt størri slagsíðu.

Halgafelli sigldi innanskers, og umstøðurnar eru ikki serliga lagaligar hjá fólki, sum ikki er staðkent, men skiparin varð biðin um at sigla norður um Andoy eftir einum losi.

Klokkan tíggju minuttir yvir tvey gjørdi skiparin av, at manningin skuldi fara av skipinum, og hesum boðaðu teir eisini norsku bjargingartænastuni frá.

Teir høvdu tá sent tveir skjóttgangandi bjargingarbátar til Halgafelli, og teir vóru hjá skipinum beint áðrenn klokkan trý.



Tað var á leiðini við Andoy, at Halgafelli bar við land

Rak móti landi

Eftir at tað hevði eydnast skiparanum at fáa skipið av aftur, tók tað at reka, samstundis sum tað fyltist meira og meira við sjógvi.

Alt bendi á, at skipið fór at søkka innan alt og long tíð var fráliðin, og tað var eisini endin, hóast tað gingu meiri enn fýra tímar áðrenn skipið fór til botns.

Bjargingartænastan sendi eisini størri bjargingarskip á leiðina við tí fyri eygað, at gera fast á skipið og toga tað til lands, men tað var ikki hugsingur um, tí veðrið á leiðini har Halgafelli fór á land, var rættiliga illfýsi.

Hvassur vindur og grovur ælingur, og tað hevði alt við sær, at tað ikki var møguligt at bjarga skipinum.

Bent Ove Jamtli, vakthavandi bjargingarleiðari hjá norsku bjargingartænastuni í Bodø, sigur við Sosialin, at umstøðurnar vóru ikki til at bjarga skipinum, tí tað vísti seg, at veðrið var nógv verri enn teir upprunaliga hildu.

Klokkan var tjúgu minuttir í seks í morgun, tá Halgafelli sakk á 30 metra dýpi, tætt við Andoynna.

Skipið liggur á positiónini 69,10 stig norður og 15,39 eystur.

Allir hava tað gott

Øll manningin, uttan skiparin, lá í koyggjunum, tá tað brast.

Kortini gekk ikki long tíð, áðrenn allir sum ein stóðu í draktum á dekkkinum, klárir at fara í bjargingarbátin, og tað gjørdu teir lítla løtu seinni.

Hóast teir lógu í bátinum í ein góðan hálvan tíma áðrenn teir vóru tiknir umborð á Knut Hoem, sum bjargingarbáturin eitur, so var støðan góð, og teir hava tað allir gott.

Tá vit tosaðu við skiparan í gjár, høvdu teir júst fingið sær ein bita, og løtu seinni fóru teir í býin at keypa sær klæðir, tí, sum hann tók til:

– Men hvussu vit skulu koma í býin veit eg ikki, tí vit eru meiri ella minni skóleysir, sigur Torbjørn.

Hann væntar, at manningin fer beina leiðina til Føroya í dag. Skipið er tryggjað í Føroyum og av tí at reiðaríið eisini er í Føroyum, verður sjóforhoyri eftir øllum at døma her.

Halgafelli, av Glyvrum, liggur nú á havsins botni við norsku oynna Andoy, eftir at skipið týsmorgunin rendi á ein flúr. Hóast tað eydnaðist at fáa skipið av aftur, var skaðin so stórur, at tað sakk
Mynd: Skipalistin 2000

Bangnir fyri dálking

Halgafelli var júst farið aftur í sigling nú tað sakk, og hevði tískil nógva olju umborð.

Tað var eisini tað, sum hevði størstan áhuga hjá løgregluni í Noregi, tí teir eru sera bangnir fyri oljudálking.

Torbjørn Jacobsen, sigur, at Halgafelli hevði 138.000 tons av olju umborð, umframt 9 tons av smyrjiolju.

Teir komu úr Lofoten og vóru á veg til Tromsø eftir frystum makreli, sum teir skuldu flyta til Murmansk, nú óhappið hendi.

Halgafelli varð bygt á Skála Skipasmiðju í 1985, og var 1957 BRT til støddar.

– Eitt lívsverk fór til botns

Tað var stríð hjá fleiri ættarliðum á Glyvrum, sum fór til botns, tá Halgafelli sakk týsmorgunin. Um nýtt skip verður útvegað er ov tíðliga at siga nakað um, men tað er nærliggjandi, sigur Torbjørn Jacobsen, sum stóð á brúnni tá skipið fór á land

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað var skiparin sjálvur, sum stóð á brúnni, tá Halgafelli rendi á land, innanskers við Andoynna í Norðurnoregi.

Hann sigur, at veðrið var ringt; hvassur vindur við grovum ælingi, tá tað hendi, og í slíkum veðrið eru umstøðurnar ikki tespligar at sigla har um vegir.

Farvatni er fult av flúrum, og tað var eisini ein slíkur, sum gjørdist banin hjá Halgafelli.

– Eg visti, at har eru nógvir flúrar, og eg hevði júst snarað um ein hólm við einum fýri, tá eg fór yvir til radaran. Tá eg hugdi uppaftur, sá eg at tað breyt frammanfyri, og at tað var ov seint at bakka, tí vit sigldu við fullari ferð. Eg royndi at venda, men ov seint var, sigur Torbjørn Jacobsen um óhappið.

Hansara meting er, at tað hevur verið knallharður streymur, sum hevur drigið skipið av kós, og so var galið, sum hann tekur til.

– Eg hevði dragað um vitan beint frammanundan, so eg visti av skerinum, sigur hann.

Eitt lívsverk er horvið

Nú Halgafelli er horvið, er tað fyrstu ferð í langsamiliga tíð, at ættin ikki hevur skip. Hóast tað er í so tíðliga at spyrja slíkan spurning, so spyrja vit kortini Torbjørn, um hann framvegis ætlar sær at hava skip.

– Tað er nærliggjandi at hugsa so, tí vit hava havt skip í familjuni í fleiri ættarlið. Hetta er í grundini eitt heilt lívsverk, sum nú er horvið, og tað er nærliggjandi at hugsa sær, at vit fara at fáa okkum skip aftur, sigur hann.

Hann leggur afturat, at hann veit ikki hvat hendir við Halgafelli nú. Tryggingin hevur nú ábrygdina av skipinum, men hann dugir illa at ímynda sær, at skipið verður tikið uppaftur.

Men umstøðurnar at byrja av nýggjum eru betri enn hjá so mongum, tí skuld er eingin í skipinum.

– Vit skylda ikki eina krónu í skipinum. Men lat okkum nú síggja fyrst, sigur Torbjørn.

Rósar norsku bjargingartænastuni

Nú hann er komin upp á turt, og situr og hyggur aftur á tað, sum fór fram, rósar hann norsku sjóverjuni fyri skjótt arbeiði.

– Eg haldi teir siga, at teir skulu vera á staðnum, í seinasta lagið tjúgu minuttir eftir at óhappið er hent, og tað var ikki nógv av leið, sigur Torbjørn.

Hann vísir á, at slík bjargingartænasta er góður tryggleiki hjá sjómonnum, sum baldrast úti á havinum og mangan í ótespiligum veðrið.

Norðmenn skulu eiga tøkk fyri, at teir bóru so skjótt at, leggur hann afturat.

– Hetta er ein skipan vit áttu at havt har heima eisini, sigur Torbjørn og leggur afturat, at tað løgna er, at hann hevur ein fyrispurning inni á tingið, um júst hetta.

So løgið kann tað vera.

Manningin á Halgafelli fær eisini rósandi orð á vegnum frá skiparanum; tí hóast teir svóvu tá skaðin hendi, vóru teir ótrúliga skjótir upp á dekkið, sigur Torbjørn.

– Eg haldi ikki tað gekk nógv meiri enn ein góðan minuttur frá tí tað brast til teir stóðu á dekkinum, og tað var ongantíð nøkur ábending um panikk, og tað er einastandandi tá ein verður skriktur úr svøvni, sigur Torbjørn.

Hvat Torbjørn fer at takast við nú hann kemur heimaftur veit hann ikki, men hann hevur farloyvið frá tinginum har hann annars eigur ein sess.

Tá vit spyrja hann, um hann fer at taka sæti aftur á tingið nú hann er heima aftur veit hann ikki.

– Tað fáa vit at síggja, sigur hann at enda.